Kappingareftirlitið

Hagar hf
Holtavegi 10
104 Reykjavík

Att. Kári Davidsen, advokat

Tórshavn, tann 27-11-2024

Viðv. mál nr.: 24/00416

Kappingareftirlitið fekk tann 6. november 2024 einfalda fráboðan, sbrt. § 17, stk. 2, um, at Hagar hf keypir allan partapeningin í P/f SMS.

Talan er um eina transaktión sum kemur undir samanleggingarhugtakið í §13, stk. 1, nr. 1 í kappingarlógini. Talan er um eina samanlegging eftir §13, stk. 1, nr. 1 tá tvær ella fleiri fyritøkur, sum hava virkað sjálvstøðugt, verða lagdar saman.

Samanleggingin skal fráboðast, sbrt. §16, stk. 1 í kappingarlógini, tí minst ein av luttakandi fyritøkunum hevði ein árligan umsetning í Føroyum á 75 mió. kr. seinasta ár og minst onnur av luttakandi fyritøkunum hevði ein umsetning á 75. mió. kr. á heimsstigi seinasta ár, sbrt. §14, stk. 1, nr. 2 í kappingarlógini

Luttakandi fyritøkur hava fráboðað eftir einfaldum leisti, tí fráboða er eftir §14, stk. 1, nr. 2, sbrt. § 3, stk. 1, pkt. 4 í reglugerð nr. 2 frá 20. Juli 2012.

Hagar hf er eitt íslendskt børsskrásett felag, ið er skrásett á íslendska Nasdaq. Gjøgnum dótturfeløg rekur Hagar hf handilsketur og virksemi knýtt at hesum. Serliga er tað søla av gerandisvørum og rakstur av beinsinstøðum á íslendska marknaðinum.

P/f SMS er eitt føroyskt samtak, sum við dótturfeløgini P/f Miðlon, P/f Dvøljan, Sp/f Rumbul og Sp/f Hair Couture, fast við sølu av gerandisvørur, rakstur av fastogn og matstovum. Aftrat hesum eigur P/f SMS í onnur feløg, sum eru P/f Burn, P/f Burn Fitness, Sp/f Omaná og Sp/f Demmus.

Samanleggingin er skipa á tann hátt, at íslendska Hagar hf keypir allan partapeningin í P/f SMS, sum sambært treytaða søluavtaluni er [....] DKK, harav eigararnir í P/f SMS, sum liður í søluavtaluni, keypa ein part av Hagar hf, svarandi til [....] DKK, í partabrøvum.

Samanlegging er millum útlendskt felag sum ikki hevur virksemi á føroyska marknaðinum og P/f SMS sum er virkið á fleiri føroyskum marknaðum. Tá ið vatnrøtt samanlegging fer fram í millum partar, sum ikki hava virksemi á sama landafrøðiliga marknað, men virka á sama vørumarknað, skal metast um hvørt útlendska felagið er ein møguligur kappingarneyti hjá SMS, og í hvønn mun samanleggingin av hesi orsøk kann vera kappingaravlagandi.

Kappingareftirlitið

Sambært vegleiðingini hjá ES-Kommissiónini (2004/C 31/03), skulu tvær treytir vera uppfyltar, fyri at talan er um ein møguligan kappingarneyt, sum munandi forðar fyri virknari kapping. Hesar treytir eru 1) at møguligi kappingarneyðtin longu hevur eina munandi avmarkandi ávirkan ella hægst sannlíkt at tann møguligi kappingarneyðtin verður ein effektivur kappingarneyti 2) Avmarkað tal av øðrum møguligum kappingarneytum, sum ikki kunnu varðveita nøktandi trýst á kappingina eftir samanleggingina.

Út frá einar heildarmeting, við støði í viðkomandi marknaði hjá P/f SMS og Hagar hf, er tað ósannlíkt, at samanleggingin kemur undir tær treytir, sum ES-Kommissiónin hevur sett. Hetta er tí, at Hagar hf ikki er á føroyska marknaðinum, og at tað eru fleiri virknir aktørar á føroyska marknaðinum fyri gerandisvørur. Tað er heldur ikki óhugsandi, at aðrar norðurlendskar fyritøkur síggja Føroyar sum ein viðkomandi marknað. Tískil er samanleggingin ikki mett at forða munandi fyri virknari kapping.

Kappingareftirlitið hevur við heimild í § 15, stk. 5, í kappingarlógini, tikið avgerð um, at góðkenna yvirtøkuna hjá Hagar hf av P/f SMS, vísandi til § 15, stk. 2, í kappingarlógini um at ein yvirtøka, sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping, skal góðkennast.

Terje Sigurðsson
Deildarstjóri

Teitur Friðuson Andreasen
Fulltrúi